# Óli klárar seg fínt uttan bil



*Tað er ikki ofta, at Óli Jacobsen situr á førarasetrinum í einum bili*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Í síðstu viku var Óli Jacobsen gestur í Bilradio á Rás2. Tað er ikki tí at hann á gamalsaldrinum er farin at koyra bil, men av tí at hann ongantíð hevur koyrt bil og hevur ikki koyrikort. Hann hevur eisini verið úti fyri onkrum hendingum í ferðsluni**

Óli Jacobsen, fyrrverandi formaður í Fiskimannafelagnum og núverandi journalistur á Sosialinum, sigur, at hann ongantíð hevur tikið koyrikort og heldur ongantíð koyrt bil.

Hóast konan og tey flestu av børnunum hava koyrikort og tveir bilar eru í húsinum, hevur Óli ongar ætlanir um at taka koyrikort. Hann er í dag 65 ára gamal.

Í sendingini sigur hann frá, hvussu tað var í Gøtu, har hann vaks upp, og hvussu hann minnist teir sum koyrdu rutukoyring har. Hann hevur ferðast nógv uttanlands og hevur verið úti fyri onkrum óhappi í ferðsluni, bæði á súkklu og sum fótgangari uttanlands.

Óli letur væl at ferðsluni í Føroyum sum fótgangari, men hevur tó onkur hjartasuff í sambandi við bussar og buss-stoppistøð. Hann brúkar nógv bussarnar, bæði Bussleiðina í Havn og Bygdaleiðir.

Sendingin Bilradio á Rás2 har Óli er gestur, verður endursend leygarmorgunin 20. desember kl. 10.

**mg**

# Citroën 2CV fyllir 60 ár

Í ár eru 60 ár liðin síðan tann kendi Citroën 2CV fyrstu ferð alment varð sýndur fram í 1948. Bilurin var annars gjørdur klárur at framleiðsla í 1939, men annar veraldarbardagi gjørdi, at bilurin varð útsettur í nøkur ár. Citroën 2CV var fyrstu ferð sýndur fram á Paris Motor Show í 1948 og kom á marknaðin árið eftir.

Bilurin varð gjørdur í samfull 42 ár. Framleiðslan steðgaði í 1990. Tá vórðu yvir fimm milliónir 2CV framleiddir. Citroën 2CV hevði nógv kelinøvn sum t.d. Studenta-Jaguar og Rugguhesturin.

Nógv verður framvegis gjørt burturúr at 2 CV fyllir 60 ár. Í heyst hevur ein stór 2 CV framsýning verið á eini vísundaligari miðstøð í París og á høvuðssætinum hjá Citroën í París hava eisini 2 CV framsýningar verið, eins og á altóða bilaframsýningini í París í oktober.

Nýggjasta tiltakið er ein oyðimarkarferð, har fýra 2 CV eru við í tí sonevnda "2 CV Mehari Cup", sum er ein ruta upp á 6.000 kilometrar frá Cassis (Kasis), nærhendis Marseille í Fraklandi til Dakar í Senegal. Rutan er stórt sæð gjøgnum sandin, sum er millum Marokko og Senegal.

**mg**



*Citroën 2CV hevði nógv kelinøvn sum t.d. Studenta-Jaguar og Rugguhesturin*



*Citroën 2CV var gjørdur klárur at framleiðsla í 1939*



*Citroën 2CV er ein kultbilur*



*Fýra 2 CV eru við í tí sonevnda "2 CV Mehari Cup", sum er millum Marokko og Senegal*